

Flestu fordómarnar og mótstøðuna havi eg møtt í Havn. Eg fekk ikki frið í Havnini, og eg fekk eisini nøkur hóttandi sms-boð. Men tað er hóast alt nøkur ár síðani. Vónandi er støðan broytt, sigur Anna Djurhuus

MYND: JENS KRISTIAN VANG

» Eg visti beinan vegin, at eg var til gentur. Tað føldist gott og rætt uppá allar mátar at mussa eina gentu

tað seg, at tey nærmastu stuðlaðu henni, tá ið hon greiddi teimium frá sínum loyndarmáli.

– Familjan og vinirnir hava ongantíð havt nakran trupulleika við, at eg eri samkynd. Summi blivu væl skiljandi rættiliga bilsin, men tey hava altíð góðtikið meg, sum eg eri. Tað er eri ótrúliga glað fyri, greiður Anna Djurhuus frá.

## Samkynd skulu brenna í helviti

Í Føroyum hevur seinastu árini verið tosað nógv um samkynd, teirra kor og rættindi. Anna Djurhuus hevur eisini upplivað nøkur neilig ting gjøgnum ár og dag, men í dag stórtrívist hon í Vági.

– Tað er fantastiskt at búgva í Vági. Men tað havi eg eisini familju og vinum at takka fyri. Tað hevur ikki altíð verið lætt, sigur Anna Djurhuus.

At búgva í einum lítlum samfelag og í eini lítlari bygd sum Vág hevur eisini sínar keðiligu síður.

– Tað ringasta er slatur, sum mangan er ógvuliga særandi. Men samstundis kenni eg øll her, og eg føli meg trygga her, sigur Anna Djurhuus.

Men hóast tryggleikan í Vági, so eru tað summi, sum trúgva teimum sokallaðu mytunum um samkynd.

– Summi halda, at tað er ein sjúka, sum smittar. Onnur halda, at eg eri at meta við ein pedofil. Og summi halda enntá, at eg havi uppiborið at brenna í helviti. Summi eru eisini bangin fyri, at samkynd royna eftir øllum av sama kyni. Tað geri eg altso ikki – eg eri rættiliga kræsin, sigur Anna skemtandi.

Hon hevur eisini roynt at búgva í Havn, men har var støðan verri um nakað.

– Flestu fordómarnar og mótstøðuna havi eg møtt í Havn. Eg fekk ikki frið í Havnini, og eg fekk eisini nøkur hóttandi sms-boð. Men tað er hóast alt nøkur ár síðani. Vónandi er støðan broytt, sigur Anna Djurhuus.

Tey hóttandi sms-boðini settu síni spor, og hennara lív í Havnini var nakað merkt at tí. Men hon valdi at taka frástøðu frá slíkum atburði og bara fáa sær eitt nýtt, dult telefonnummar.

– Tey skrivaðu til mín, at eg ikki skuldi spreiða slíka sjúku í Føroyum. Og at eg hevði uppiborið at brenna í helviti fyri mínar syndir, sigur Anna.

## Lætt, at fáa eina damu við heim

Flest øll vilja hava ein maka at liva lívið saman við, og soleiðis er eisini við Annu Djurhuus. Ein myta um samkynd er, at tað er trupult hjá føroyskum samkyndum kvinnum at finna ein maka ella eina at deila eina nátt saman við. Men hendan trupulleikan kennir Anna Djurhuus ikki til.

Anna hevur verið í parlagi nakrar ferðir, men hevur enn ikki funnið sína einastu einu.

– Tað er eingin trupulleiki at finna sær eina damu at taka við heim eina nátt. Men tað er nakað verri at finna ein maka, sigur Anna Djurhuus.

Samfelagið er lítið, og kvinnur hava trupult við at viðurkenna sín samkynda hug við at fara alment í eitt parlag við henni.

## Børnini skulu kunnast um samkynd

Hóast Anna trívist væl í Føroyum, so eru summi viðurskifti, sum hon fegin vildi broytt, fekk hon møguleikan.

– Eg haldi, at børn og ung í Føroyum skulu upplýsast um samkynd. Tað hevði avgjørt minkað um fordómarnar, sum fólk hava móti samkyndum. Fordómar koma jú av óvitan, sigur Anna Djurhuus.

Eisini heldur hon, at rættindini hjá teimum samkyndu skulu betrast í Føroyum.

– Eg vildi ynskt, at okkara rættindi gjørdust betri. Til dømis skrásett parlag og ættleiðing, sigur Anna Djurhuus.

Nú hava vit lisið nógv um mytur mótvegis samkyndum, men tað er eisini ein myta um føroyska samfelagið, sum Anna ger upp við.

– Um ein vil trívast onkustaðni, so er bara at gera nakað fyri tað. Tað er nógv at takast við her suðuri í Vági, og eg hugni mær óført og livi eitt »normalt« lív saman við mínum nærmastu, sigur Anna Djurhuus, sum slær fast, at hon altíð vil búgva her á klettunum.